## MVH – Maskinverkstaðurin á Hjalla:

# Stórur og framkomin verkstaðsbygningur

Í sambandi við at nýggi verkstaðsbygningurin hjá MVH – Maskinverkstaðnum á Hjalla verður tikin í nýtslu, var opið hús á verkstaðnum hósdagin 12. mars.

Nýggi bygningurin, sum er upp á túsund fermetrar, er bygdur afturat gamla bygninginum hjá MVH, so nú húsast fyritøkan á millum 13- og 1400 fermetrum.

Verkstaðurin er væl útgjørdur og hevur alt tað sum krevst til fyri at kunna umvæla lastbilar, bussar og entreprenørmaskinur. Í nýggju høllini er pláss fyri fleiri stórum akførum, t.d. kunnu 10 stórir bussar standa inni har samstundis.

MVH – Maskinverkstaðurin á Hjalla selur Volvo bussar, lastbilar og Komatsu entreprenørmaskinur. Tað eru fýra feløg sum eiga MVH, tey eru Faroe Ship, Tjaldur, VR-Bilar og Elvi, sum er eitt dóttirfelag hjá Articon.

Umleið 100 fólk vóru til móttøkuna, har stjórin Bárður Nielsen, og Niclas Joensen frá ArtiCon greiddu frá um MVH og endamálið við fyritøkuni. Jógvan Olsen spældi tónleik undir móttøkuni

*mg*



*Nýggi bygningurin er bygdur afturat gamla bygninginum hjá MVH*

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Bárður Nielsen er stjóri á MVH - Maskinverkstaðnum á Hjalla*



*Niclas Joensen frá ArtiCon*



*Jógvan Olsen spældi tónleik undir móttøkuni*




*Høllin er stór og pláss er t.d. fyri 10 stórum bussum samstundis*



*Umleið 100 fólk vóru til móttøkuna hjá MVH*